# Ársfrágreiðing
## 2025



bústaðir
Føroya bústaðafelag

# Innihald

Bústaðir styrkja fíggjarliga grundarlagið 3

Leigubústaðir kring landið 4

Yvirlit yvir leigubústaðir 5

Limir 6

Ársroknskapur 7

# Bústaðir styrkja fíggjarliga grundarlagið og gera klárt til nýggjar verkætlanir

## Ársroknskapurin fyri 2025 vísir munandi framgongd: Ársúrslitið eftir skatt gjørdist 5,5 mió. kr. (0,4 mió. kr. í 2024), og grunnurin stendur nú sterkari til at fara undir nýggjar leigubústaðarverkætlanir.

Vit síggja nú úrslitið av teimum tillagingum, sum eru gjørdar í rakstrinum, og av teirri kós, sum er sett seinastu tvey árini. Hetta setir okkum í eina munandi betri støðu, nú vit skulu taka avgerðir um, hvørjar framtíðar bústaðarverkætlanir vit fara undir, sigur Jógvan Ósá, stjóri í Bústøðum.



Í 2025 hevur leiðslan lagt dent á at styrkja langtíðarhaldførið hjá grunninum. Millum annað er ein langtíðarfíggjarætlan gjørd fyri komandi 10 árini og ein langtíðarviðlíkahaldsætlan fyri komandi 20 árini. Tær skulu tryggja eitt skipað grundarlag undir langtíðarstrategini hjá Bústøðum.

Sum liður í at minka um rentuváðan og styrkja kapitalgrundarlagið er øll lániskuldin hjá grunninum umfíggjað. Av lánunum eru 60% rentutryggjað – lutvíst í 5 ár og lutvíst í 30 ár. Harumframt hevur grunnurin fingið tilsøgn um meirfígging til komandi íløgur. Umfíggingin skal tryggja gjaldførið og geva rúm til nýggjar verkætlanir komandi árini.

Fyri at kunna røkja verandi leiguognir og byggja fleiri leiguíbúðir er neyðugt við sunnum rakstri og sterkari eginogn. Hetta er samstundis ein fortreyt fyri, at fíggingarstovnar hava álit á grunninum og vilja veita fígging til nýggjar íløgur.

Við úrslitinum fyri 2025 er eitt sterkari fíggjarligt grundarlag lagt undir stovnin, sum nú kann seta ferð á nýggjar bústaðarverkætlanir. Frameftir fara vit at leggja dent á at menna og útbyggja útboðið av leigubústøðum við støði í veruliga tørvinum í samfelagnum.

Sum liður í fyrireikingunum hevur Bústaðir sett eina tørvskanning í verk millum limirnar. Greiningarfyritøkan Lóður hevur vegna grunnin sent spurnarblað út, og svarini skulu geva okkum betri vitan um bæði verandi og komandi tørv á leigubústøðum. Endamálið er, at nýggjar verkætlanir í størri mun skulu samsvara við tørvin hjá limunum og samfelagnum sum heild.

Samlaða ognin hjá Bústøðum var við árslok umleið 1,1 milliard krónur, og eginognin var umleið 623 mió. krónur.

# Leigubústaðir kring landið



# Yvirlit yvir leigubústaðir

| Leigubústaðir | Stað | Íbúðir | m² | Ár | Leiga |
|---|---|---|---|---|---|
| Toftanesvegur | Fuglafjørður | 18 | 94-104 | 2023 | 11.166-12.186 |
| Sundsvegur | Hvannasund | 3 | 84 | 2019 | 6.914 |
| Heygavegur | Klaksvík | 8 | 54 | 2015 | 5.122 |
| Kráarbrekka | Klaksvík | 24 | 50-70 | 2015 | 5.109-6.586 |
| Biskupstorg | Klaksvík | 30 | 72-143 | 2019 | 6.562-12.770 |
| Næmingaheim Rótin | Klaksvík | 24 | | 2025 | - |
| Við Ranggil | Leirvík | 5 | 63-78 | 2014 | 4.750-6.086 |
| Undir Bjørgum | Oyrarbakki | 8 | 82-92 | 2014 | 5.720-6.278 |
| Blikagøta | Runavík | 16 | 64-78 | 2018 | 5.499-6.574 |
| Steigarbrekka | Sandavág | 5 | 81 | 2023 | 8.773 |
| Heimasandsvegur 86 | Sandur | 5 | 84 | 2020 | 7.309 |
| Skúlavegur | Skopun | 2 | 60 | 2014 | 3.781 |
| Garðsvegur | Sørvágur | 5 | 85 | 2015 | 6.463 |
| Undir Bólheyggi | Sørvágur | 5 | 70 | 2021 | 7.714 |
| Dávagerði 2-14 | Strendur | 7 | 79 | 2018 | 6.693 |
| Heinagerð | Streymnes | 7 | 92 | 2023 | 9.800 |
| Á Kneysum | Toftir | 10 | 50-75 | 2021 | 5.772-7.828 |
| Búfelagsk. á Kneysum | Toftir | 19 | 50 | 2026 | - |
| Karlamagnusarbr. 34 | Tórshavn | 12 | 54-100 | 2018 | 5.558-8.963 |
| Karlamagnusarbr. 32 | Tórshavn | 6 | 100-104 | 2018 | 9.203 |
| Íslandsvegur 22 | Tórshavn | 4 | 33-105 | 2013 | 4.147-6.706 |
| Íslandsvegur 24 | Tórshavn | 4 | 37-91 | 2013 | 4.147-6.706 |
| Heimasta Horn | Tórshavn | 24 | 87-105 | 2014 | 6.845-8.641 |
| Stoffalág 90-92 | Tórshavn | 8 | 56 | 2015 | 5.319 |
| Óðinshædd 32-74 | Tórshavn | 22 | 54-86 | 2017 | 6.261-7.530 |
| Jekaragøta | Tórshavn | 12 | 54-99 | 2016 | 6.574-10.516 |
| Næm. undir Fjalli | Tórshavn | 30 | 18-36 | 2017 | 2.631-5.154 |
| Finsen | Tórshavn | 35 | 30-102 | 2018 | 3.394-10.182 |
| Studentask. í Berjabr. | Tórshavn | 16 | 15 | 2018 | 2.154 |
| Oman Mattalág | Tórshavn | 38 | 54-104 | 2019 | 6.211-10.310 |
| Óðinshædd II, | Tórshavn | 50 | 42-85 | 2020-2022 | 6.470-10.088 |
| Undir Ryggi 4 | Tórshavn | 1 | 70 | 2022 | 7.676 |
| Óðinshædd III | Tórshavn | 19 | 71-78 | 2023 | 10.691-11.673 |
| Blómubrekka 43-61 | Tórshavn | 10 | 110 | 2022 | 11.624 |
| Blómubrekka 11-41 | Tórshavn | 16 | 61-80 | 2023 | 9.265-10.940 |
| Berjabrekka 2-24 | Tórshavn | 12 | 57 | 2023 | 7.519 |
| Heimasta Horn II ** | Tórshavn | 22 | 83 | 2023 | 11.300 |
| Dalabú ** | Tórshavn | 44 | 50-91 | 2026 | 8.214-13.578 |
| Heiðatrøðin | Tvøroyri | 3 | 103 | 2014 | 6.463-6.828 |
| Heiðatrøðin II | Tvøroyri | 8 | 65-82 | 2023 | 8.146-9.921 |
| Við Kykslið | Vágur | 6 | 81-137 | 2016 | 5.242-7.558 |
| Næmingaheim | Vágur | 21 | 13-26 | 2021 | - |
| Í Mýrunum | Vágur | 6 | 87-97 | 2023 | 7.833-8.250 |
| Bakkavegur 16 | Vestmanna | 7 | 45-95 | 2022 | 5.922-8.773 |

# Limir

Hvílandi 972

Leitandi 1.773

Leigumál 586

Miðal húsaleiga 7.691 kr.

## Aldursbýti á limalista




## Aldursbýti av leigarum



# Bústaðir

## Ársfrásøgn

## 1. januar - 31. desember 2025

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á stýrisfundi, tann        /

__________________________________

Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 9 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 10 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 13 |
| Leiðslufrágreiðing | 14 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2025** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 16 |
| Rakstrarroknskapur | 21 |
| Fíggjarstøða | 22 |
| Pengastreymsuppgerð | 24 |
| Notur | 25 |

## Leiðsluátekning

Stýri og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2024 hjá Bústøðum.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ásetingarnar í galdandi lóg og kunngerð fyri grunnin.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2025 og av úrslitinum av grunsins virksemi og pengastreymi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøðir.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 28. apríl 2026

**Stjórn**

Jógvan Ósá
stjóri

**Stýri**

| | | |
|---|---|---|
| Teitur Samuelsen<br>formaður | Ingibjørg Berg | Maud Hilduberg |
| Rakul í Gerðinum | Petur Even Djurhuus | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

### Til stýrið í Bústaðir

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Bústøðum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, pengastreymsuppgerð og notum. Ársroknskapurin er tillagaður ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2025 hjá grunninum  og av úrslitinum av virkseminum og peningastreymunum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2025.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardar um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av grunninum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við galdandi lóggávu og kunngerðir. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um grunnurin megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka grunnin, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

### Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um grunnurin megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at grunnurin ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við galdandi lóggávu og kunngerðir. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 28. apríl 2026

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Óli Joensen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Bústaðir<br>Yviri við Strond 6<br>Postsmoga 215<br>Tórshavn | |
| | Telefon: | 40 10 00 |
| | Telefax: | bustadir@bustadir.fo |
| | Heimasíða: | www.bustadir.fo |
| | V-tal: | 589.810 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Teitur Samuelsen, formaður<br>Ingibjørg Berg<br>Maud Hilduberg<br>Rakul í Gerðinum<br>Petur Even Djurhuus | |
| **Stjórn** | Jógvan Ósá, stjóri | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |
| **Assosierað felag** | P/F Heimasta Horn II, FO-100 Tórshavn | |

## Leiðslufrágreiðing

### Ársfrágreiðing 2025

**Samandráttur**

Húsalánsgrunnurin virkar eftir Løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 22. mai 2023.

Lógin heimilar Húsalánsgrunninum at veita orkulán, at veita veðskuldarlán til íbúðafeløg v.m., at útvega, reka og leiga út íbúðir og veita realkredittlán at fíggja føroyskar bústaðir.

Sambært lógarbroytingini í 2011 avráddi stýrið fyri Húsaláns- grunnin, í samráð við Fíggjarmálaráðið og Almannamálaráðið, at grunnurin frameftir skuldi raðfesta sítt virksemi eftir at virka sum eitt bústaðapolitiskt amboð heldur enn sum útlánsstovnur. Í tráð við hetta hevur grunnurin, nú virkandi sum Bústaðir – Føroya Bústaðafelag, gjørt stórar íløgur í leigubústaðir seinastu árini.

Húsalánsgrunnurin hevur seinasta hálvtannað árið gjørt munandi tillagingar í rakstrinum hjá felagnum. Starvsfólkatalið er lækkað munandi, og hetta sæst aftur í rakstrarúrslitinum í 2025. Aðrar sparingar og rakstrarumleggingar fáa tó ikki fulla roknskaparliga ávirkan fyrr enn í roknskaparárinum 2026.

Leiðslan hevur í 2025 lagt munandi orku í at styrkja langtíðarhaldførið hjá grunninum. Ein langtíðarfíggjarætlan fyri komandi 10 árini er gjørd, umframt ein langtíðarviðlíkahaldsætlan fyri komandi 20 árini. Hetta eru týðandi stýrisamboð, ið skulu tryggja eitt skipað grundarlag undir langtíðarstrategi grunsins.

Sum liður í at minka um rentuváðan og styrkja kapitalgrundarlagið hjá grunninum hevur leiðslan umfíggjað alla lániskuldina hjá grunninum. Av hesum eru 60% rentutryggjað, partvíst í 5 ár og partvíst í 30 ár. Harumframt hevur grunnurin fingið tilsøgn um meirfígging til komandi íløgur. Umfíggingin tryggjar gjaldførið til rakstur og viðlíkahald, umframt fígging til nýggjar verkætlanir komandi árini.

Roknskaparliga tíðarskeiðið er frá 1. januar til 31. desember 2025.

**Bústaðarverkætlanir**

Við ársbyrjan 2025 vóru tríggjar verkætlanir í gerð: vistarheimið í Húsahaldsskúlanum í Klaksvík, búfelagsskapurin við Kneysar á Toftum og býlingurin við Dalabú í Havn. Samlað fevna hesar verkætlanir um 62 leiguíbúðir og 35 lestrarkømur, sum vórðu tikin í nýtslu í 2025 og í fyrstu tveimum mánaðunum í 2026. Býlingurin við Dalabú er í 2026 seldur til bústaðarfelagið Heimbýli, sum Tórshavnar kommuna og Húsalánsgrunnurin eiga í felag.

Í samband við byggingina av Húsarhaldsskúlanum í Klaksvík, varð játtaður ein løgustuðul uppá 9 mió. kr. til verkætlanina. Hetta er gjørt fyri at minka um leiguna, sum húsahaldsskúlin skal gjalda fyri vistarheimið.

Leiðslan arbeiðir leypandi við menning av nýggjum verkætlanum, og ætlanin er, at ein ella fleiri verða settar í verk í 2026. Harumframt hevur Húsalánsgrunnurin yvirtikið umsitingarbygningin hjá táverandi Almanna- og heilsumálaráðnum, sum verður bygdur um til lestraríbúðir.

## Leiðslufrágreiðing

### Útlán

Seinastu árini eru útlánini minkað munandi. Hetta bæði orsakað av innfrían av eldri lánum og orsakað av, at tað ikki legst afturat við nýggjum orkulánum. Útlánini eru fallin úr 57,3 mió. kr. við árslok í 2024 til 50,1 mió. kr. við árslok í 2025.

### Ársúrslit

Rakstrarúrslitið fyri 2025 er tkr 22.168, ið er tkr 10.376 hægri enn í 2024, tá rakstrarúrslitið var tkr 11.792. Ársúrslitið eftir skatt gjørdist sostatt eitt avlop á tkr. 5.506, samanborið við tkr. 424 í 2024.

Leiguognirnar hjá grunninum fara at krevja størri viðlíkahaldsútreiðslur komandi árini, og tí er neyðugt, at grunnurin hevur ein sunnan rakstur, so sett kann verða av til langtíðarviðlíkahald.

Stýrið hevur samtykt ikki at lata vinningsbýti fyri roknskaparárið 2025.

Samlaða ognin hjá grunninum var pr. 31. desember 2025 1.099 mió. kr., og eginognin hjá grunninum var 623 mió. kr.

### Framtíðarútlit

Óvissan á heimsmarknaðinum ger tað avbjóðandi at gera álítandi metingar av kostnaðarstøðnum á vørum og tænastum. Tó eru ábendingar um ein ávísan prísvøkstur í 2026, sum væntandi fer at økja um útreiðslurnar hjá grunninum.

Prístalsvøksturin seinastu trý árini hevur í miðal verið 1,4%. Leigan hjá leigarunum verður javnað í samsvari við henda vøkstur, galdandi frá 1. juli 2026.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum eftir 31. desember 2025 og fram til dagin í dag er einki hent, sum metist at hava ávirkan á fíggjarstøðuna ella metingina av árfrásøgnini fyri 2025.

### Stýrið

Húsalánsgrunnurin verður stjórnaður av einum stýri við fimm limum. Landsstýriskvinnan tilnevnir stýrislimir annaðhvørt ár, ávíkavist tríggjar og tveir limir.

Í stýrinum sita:
Teitur Samuelsen, formaður
Petur Even Djurhuus
Maud Hilduberg
Ingibjørg Berg
Rakul í Gerðunum

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Bústaðir er tillagað ársroknskaparlógina og lóg um Húsalánsgrunnin. Grunnurin hevur valt at fylgja einstøkum ásetingum fyri fyritøkur í flokki B í ársroknskaparlógini.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár, og verður gjørd í donskum krónum (DKK)

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva grunninum fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr grunninum, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

# Nýttur roknskaparháttur

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur og rakstur av leigumálum

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar, um veiting og váði eru farin fram innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum.

Rakstur av leigumálum verður innroknaður í rakstrarroknskapinum sum ein samanlagdur postur fyri inntøkur og útreiðslur. Útgreining yvir býtið millum inntøkur og útreiðslur framgongur í notu til postin.

### Rakstrarútreiðslur

Rakstrarútreiðslur eru útreiðslur til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir og tap av áogn.

### Aðrar rakstrarinntøkur

Aðrar rakstrarinntøkur umfata roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá felagnum, herímillum vinning og tap við sølu av materiellari støðisogn.

### Avskrivingar og burturleggingar av veðskuldarbrøvum

Ásannað tap á veðskuldarbrøvum er beinleiðis útreiðsluført yvir rakstur. Avsetingin móti tapi á útlánum grunsins er gjørd út frá varisligari hagfrøðiligari heildarmeting, einsæris meting og núverandi fíggjarumstøðum í landinum.

### Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá. Løn, sum verður nýtt beinleiðis ella óbeinleiðis til byggiverkætlanir, verður førd á ognirnar í fíggjarstøðuni.

### Av- og niðurskrivingar

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av materiellari støðisogn.

### Aðrir rakstrarkostnaðir

Aðrir rakstrarkostnaðir umfata roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá felagnum, herímillum tap við sølu av materiallari støðisogn.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligir postar umfata rentur, staðfestan og ikki staðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum umframt amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Nýttur roknskaparháttur

**Skattur av ársúrslitinum**

Sbr. løgtingslóg nr. 121 frá 7. desembur 2012 er grunnurin skattskyldugur.

Skatturin í árinum, ið er skatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapinum við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum og innroknaður beinleiðis á eginognina við tí parti, sum viðvíkur bókingum beinleiðis á eginognina.

**Fíggjarstøðan**

**Immateriell støðisogn**

**Ritbúnaður**

Ritbúnaður verður virðisásettur til útveganarvirði við frádrátti av samlaðum avskrivingum ella til endurvinningarvirði, um hetta er lægri. Ritbúnaður verður avskrivaður yvir 3-7 ár.

**Materiell støðisogn**

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki og verkætlanir í gerð verða ikki avskrivað. Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð. Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Onnur materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niður-skrivingar.

Avskrivað verður yvir væntaðu brúkstíðirnar og frádrigið restvirði á ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3 - 7 ár | 0 % |
| Skrivstovubygningur | 15 - 35 ár | 40 % |
| Íbúðaognir | 50 ár | 50 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Skrivstovubygningur, íbúðaognir, onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv verða avskrivað javnt yvir væntaðu brúkstíðinar og frádrigið restvirði á ognunum.

**Niðurskriving av støðisogn**

Hvørt ár verður mett um roknskaparligu virðini á bæði immateriellari og materiellari støðisogn, umframt kapitalpørtum í dótturfyritøkum og assosieraðum fyritøkum fyri at vita, um ábending er um, at tey eru minkað meir í virði enn tað, sum er avskrivað.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

## Nýttur roknskaparháttur

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettopengastreymunum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

Áður innroknaðar niðurskrivingar verða afturførdar, tá ið grundarlagið fyri niðurskrivingini ikki er longur. Niðurskriving viðvíkjandi goodwill verður ikki afturførd.

**Veðskuldarbrøv og innskotslán**

Veðskuldarbrøv eru fyri lán í sethúsum og íbúðum og eru tikin við til áljóðandi virði (pari kurs) og frádrigin mettan tapsvanda.

**Innskot í sjálvsognarstovnar**

Innskotspeningur í sjálvognarstovnar er tikin við til áljóðandi virði (pari kurs).

**Fíggjarlig støðisogn**

**Kapitalpartar í assosieraðum feløgum**

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er endurvinningarvirði lægri enn útveganarvirði, verður niðurskrivað til lægra virðið.

**Onnur áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til netto-realisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar er forútgoldin tryggingarkostnaður.

**Stovnsfæ**

Hetta er játtan til upprunaliga Húsalánsgrunnin yvir fíggjarløgtingslógina, frá og við løgtingslóg nr. 49 frá 30. mai 1964. Í árinum er einki játtað.

**Flutt frá undanfarnum árum**

Úrslit frá rakstri grunsins verður flutt á hesa kontu.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

## Nýttur roknskaparháttur

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

### Skuld

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirðið, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

### Gjaldførisfrágreiðing

Gjaldførisfrágreiðingin vísir gjaldførisávirkanina frá rakstri, íløgum og fígging fyri roknskaparárið, broytingar í tøkum peningi, umframt tøkan pening við roknskaparbyrjan og roknskaparlok.

Gjaldførisfrágreiðingin er uppsett eftir óbeinleiðisháttinum og vísir gjaldførisávirkan frá rakstri, íløgum og fígging. Gjaldføri er samansett av tøka peninginum.

### Gjaldføri frá rakstri

Gjaldføri frá rakstri verða gjørd upp sum ársúrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarpostar, broyting í rakstrarfígging og goldnan partafelagsskatt.

### Gjaldføri frá íløgum

Gjaldføri frá íløgum eru gjøld, sum stava frá keyp og sølu av støðisognum.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 3.413.736 | 2.906.824 |
| 2 | Rakstur av leigumálum | 38.962.952 | 32.617.910 |
| 3 | Aðrar rakstrarinntøkur | 233.730 | 1.599.130 |
| 4 | Rakstrarútreiðslur | -3.767.391 | -5.249.636 |
| | **Bruttoúrslit** | **38.843.027** | **31.874.228** |
| 5 | Starvsfólkakostnaðir | -7.495.527 | -13.078.061 |
| | **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **31.347.500** | **18.796.167** |
| | Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | -9.179.192 | -7.329.653 |
| | Aðrir rakstrarkostnaðir | 0 | 325.645 |
| | **Rakstrarúrslit** | **22.168.308** | **11.792.161** |
| 6 | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 664.714 | 484.719 |
| 7 | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -15.253.178 | -11.357.577 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **7.579.844** | **919.303** |
| 8 | Skattur av ársúrsliti | -2.074.158 | -495.084 |
| | **Ársúrslit** | **5.505.686** | **424.219** |

| | 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| **Uppskot til býti av úrsliti:** | | |
| Flytast til flutt úrslit | 5.505.686 | 424.219 |
| **Býtt tilsamans** | **5.505.686** | **424.219** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**OGN**

| Nota | | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 9 | Ritbúnaður | 3.520.358 | 2.002.529 |
| | Immateriell støðisogn tilsamans | 3.520.358 | 2.002.529 |
| 10 | Verkætlanir í gerð | 143.070.152 | 275.352.216 |
| 10 | Íbúðaognir | 825.454.919 | 685.031.096 |
| 10 | Skrivstovubygningur | 5.218.406 | 5.418.882 |
| 10 | Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 694.968 | 455.216 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 974.438.445 | 966.257.410 |
| 11 | Kapitalpartur í assosieraðari fyritøku | 11.520.000 | 11.520.000 |
| 12 | Útlán | 50.147.211 | 57.296.195 |
| | Áogn hjá assosieraðari fyritøku | 17.032.412 | 17.464.431 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 78.699.623 | 86.280.626 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **1.056.658.426** | **1.054.540.565** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 19.706 | 0 |
| | Onnur áogn | 8.264.392 | 12.893.612 |
| | Tíðaravmarkingar | 754.222 | 2.882.489 |
| | Áogn tilsamans | 9.038.320 | 15.776.101 |
| | Tøkur peningur | 33.103.944 | 2.679.358 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **42.142.264** | **18.455.459** |
| | **OGN TILSAMANS** | **1.098.800.690** | **1.072.996.024** |

## Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | SKYLDUR | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 13 | Stovnsfæ | 600.803.384 | 600.803.384 |
| 14 | Flutt úrslit | 22.021.134 | 16.515.448 |
| | **Eginogn tilsamans** | **622.824.518** | **617.318.832** |
| | | | |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 15 | Avsett til útsettan skatt | 3.289.965 | 1.215.806 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **3.289.965** | **1.215.806** |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| | Vinnulán | 136.844.777 | 140.119.821 |
| 16 | Langfreistað skuld tilsamans | 136.844.777 | 140.119.821 |
| | | | |
| 16 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 3.518.390 | 2.588.763 |
| | Byggikredittir | 319.355.996 | 291.576.994 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 2.453.779 | 7.667.919 |
| 17 | Onnur skuld | 10.513.265 | 12.507.889 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 335.841.430 | 314.341.565 |
| | | | |
| | **Skuld tilsamans** | **472.686.207** | **454.461.386** |
| | | | |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.098.800.690** | **1.072.996.024** |

**18 Veðsetingar og trygdarveitingar**

## Gjaldførisfrágreiðing 1. januar - 31. desember

| | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---:|---:|
| Úrslit áðrenn skatt | 7.579.844 | 919.303 |
| Avskrivingar og burturleggingar | 9.179.192 | 7.329.653 |
| **Gjaldføri frá rakstri** | **16.759.036** | **8.248.956** |
| Onnur áogn | 5.041.553 | 12.231.534 |
| Broyting útlán | 7.148.984 | 8.184.869 |
| Tíðaravmarkingar ogn | 2.128.267 | 14.988 |
| Ognarar og onnur skuld | -7.225.538 | 504.975 |
| **Gjaldføri frá rakstrarognum** | **23.852.282** | **29.185.322** |
| Fíggjarlig støðisogn | 0 | -11.270.000 |
| Immateriell støðisogn, netto | -1.952.992 | -1.628.342 |
| Materiell støðisogn, netto | -16.908.289 | -90.725.517 |
| **Gjaldføri frá íløgum** | **-18.861.281** | **-103.623.829** |
| Avdráttir av langfreistaðari skuld | -2.345.417 | -2.503.229 |
| **Gjaldføri frá fígging** | **-2.345.417** | **-2.503.229** |
| **Gjaldførisbroytingar tilsamans** | **2.645.584** | **-76.941.766** |
| Tøkur peningur primo | -288.897.639 | -211.955.873 |
| **Tøkur peningur ultimo** | **-286.252.055** | **-288.897.639** |

| | | |
|---|---:|---:|
| **Tøkur peningur** | | |
| Tøkur peningur í peningastovnum | 33.103.941 | 2.679.358 |
| Byggikredittur | -319.355.996 | -291.576.997 |
| **Tøkur peningur ultimo** | **-286.252.055** | **-288.897.639** |

## Notur

| | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Inntøkur** | | |
| | Renta av útlánum | 2.617.772 | 2.208.995 |
| | Gjald fyri skráseting á bíðilista | 301.630 | 214.300 |
| | Uppskrivingargjald | 67.800 | 73.950 |
| | Onnur inntøka | 94.846 | 409.579 |
| | Inntøkur frá umsiting | 331.688 | 0 |
| | | **3.413.736** | **2.906.824** |
| **2.** | **Rakstur av leigumálum** | | |
| | Inntøkur av leigumálum | 44.879.987 | 32.617.910 |
| | Útreiðslur av leigumálum | -5.917.035 | -3.827.553 |
| | **Úrslit av leigumálum áðrenn  avskrivingar** | **38.962.952** | **32.617.910** |
| | Avskrivingar av leigumálum í árinum | -8.331.530 | -6.639.186 |
| | **Úrslit av leigumálum íroknað avskrivingar** | **30.631.422** | **25.978.724** |
| **3.** | **Aðrar rakstrarinntøkur** | | |
| | Vinningur við sølu av materiellari støðisogn | 233.730 | 1.599.130 |
| | | **233.730** | **1.599.130** |
| **4.** | **Rakstrarútreiðslur** | | |
| | Sølukostnaður | 83.436 | 87.146 |
| | Høliskostnaður | 478.808 | 877.144 |
| | Fyrisitingarkostnaður | 3.205.147 | 4.285.346 |
| | | **3.767.391** | **5.249.636** |

## Notur

| | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---:|---:|
| **5.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | |
| | Lønir og samsýningar | 6.053.463 | 10.947.809 |
| | Alm. gjøld, eftirløn og frítíðarløn | 1.055.392 | 1.583.911 |
| | Aðrar útreiðslur viðv. sosialari trygd | 386.672 | 546.341 |
| | | **7.495.527** | **13.078.061** |
| | Stjórn, løn og eftirløn | 990.567 | 2.084.609 |
| | Stýri, løn og eftirløn | 408.000 | 408.600 |
| | | **1.398.567** | **2.493.209** |
| | Miðaltal av starvsfólkum | 9 | 20 |
| **6.** | **Aðrar fíggjarligar inntøkur** | | |
| | Rentur, áogn frá sølu | 3.200 | 0 |
| | Rentur, onnur langfreistað áogn | 661.514 | 484.719 |
| | | **664.714** | **484.719** |
| **7.** | **Aðrir fíggjarligir kostnaðir** | | |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 15.253.178 | 11.357.577 |
| | | **15.253.178** | **11.357.577** |
| **8.** | **Skattur av ársúrsliti** | | |
| | Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| | Broyting í útsettum skatti | 2.074.158 | 495.084 |
| | | **2.074.158** | **495.084** |

# Notur

## 9. Immateriell støðisogn

| | Ritbúnaður kr. |
|---|---:|
| Útveganarvirði primo | 2.445.781 |
| Tilgongd í árinum | 1.952.992 |
| Flytingar í árinum | 268.693 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **4.667.466** |
| Av- og niðurskrivingar primo | 443.252 |
| Flytingar í árinum | 282.006 |
| Avskrivingar í árinum | 421.850 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **1.147.108** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **3.520.358** |

## Notur

### 10. Materiell støðisogn

| | Verkætlanir í gerð<br>kr. | Íbúðaognir<br>kr. | Skrivstovubyg ningur<br>kr. | Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv<br>kr. |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 277.241.389 | 724.940.794 | 7.583.538 | 2.931.419 |
| Tilgongd í árinum | 24.844.501 | 1.050.208 | 0 | 435.000 |
| Frágongd í árinum | -421.420 | 0 | 0 | -803.806 |
| Flutt frá verkætlanum í gerð til íbúðarognir | -156.705.145 | 156.705.145 | 0 | 0 |
| **Útvegnarvirði ultimo ultimo** | **144.959.325** | **882.696.147** | **7.583.538** | **2.562.613** |
| Løgujáttan frá málaráðum | 0 | -9.000.000 | 0 | 0 |
| **Uppskrivingar ultimo** | **0** | **-9.000.000** | **0** | **0** |
| Av- og niðurskrivingar primo | 1.889.173 | 39.909.698 | 2.164.656 | 2.476.203 |
| Flytingar | 0 | 0 | 0 | -96.358 |
| Avskrivingar í árinum | 0 | 8.331.530 | 200.476 | 225.336 |
| Afturføring av av- og niðurskrivingum av avhendaðum ognum | 0 | 0 | 0 | -737.536 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo ultimo** | **1.889.173** | **48.241.228** | **2.365.132** | **1.867.645** |
| **Roknskaparligt virði ultimo ultimo** | **143.070.152** | **825.454.919** | **5.218.406** | **694.968** |

## Notur

| | | 31/12 2025<br>kr. | 31/12 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **11.** | **Kapitalpartur í assosieraðari fyritøku** | | |
| | Útveganarvirði við ársbyrjan primo | 11.520.000 | 250.000 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 11.270.000 |
| | **Útveganarvirði ultimo** | **11.520.000** | **11.520.000** |
| | **Roknskaparligt virði ultimo** | **11.520.000** | **11.520.000** |

**Assosierað fyritøka:**

| | **Heimstaður** | **Ognarpartur** |
|---|---|---|
| P/F Heimasta Horn II | FO-100 Tórshavn | 50 % |

| | | 31/12 2025 | 31/12 2024 |
|---|---|---|---|
| **12.** | **Útlán** | | |
| | Sethús og íbúðir | 53.883.224 | 61.039.806 |
| | Onnur lán | 7.057.766 | 7.065.266 |
| | Sjálvsognarstovnar | 4.088.890 | 4.304.898 |
| | **Tilsamans ultimo** | **65.029.880** | **72.409.970** |
| | Burturlagt móti tapi upp á veðskuldarabrøv | -14.882.669 | -15.113.775 |
| | **Burturleggingar ultimo** | **-14.882.669** | **-15.113.775** |
| | **Roknskaparligt virði ultimo** | **50.147.211** | **57.296.195** |
| **13.** | **Stovnsfæ** | | |
| | Stovnsfæ primo | 600.803.384 | 600.803.384 |
| | | **600.803.384** | **600.803.384** |
| **14.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 16.515.448 | 16.091.229 |
| | Fluttur vinningur ella hall í árinum | 5.505.686 | 424.219 |
| | | **22.021.134** | **16.515.448** |

## Notur

| | 31/12 2025<br>kr. | 31/12 2024<br>kr. |
|---|---|---|
| **15. Avsett til útsettan skatt** | | |
| Avsett til útsettan skatt primo | 1.215.806 | 720.722 |
| Útsettur skattur av ársúrsliti | 2.074.159 | 495.084 |
| | **3.289.965** | **1.215.806** |

### 16. Skyldur

| | **Skuld tilsamans 31/12 2025 kr.** | **Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld kr.** | **Langfreistað skuld 31/12 2025 kr.** | **Restskuld aftaná 5 ár kr.** |
|---|---|---|---|---|
| Vinnulán | 140.363.167 | 3.518.390 | 136.844.777 | 122.732.586 |
| | **140.363.167** | **3.518.390** | **136.844.777** | **122.732.586** |

| | 31/12 2025<br>kr. | 31/12 2024<br>kr. |
|---|---|---|
| **17. Onnur skuld** | | |
| Skyldug løn | 0 | 1.628.958 |
| Avseting, frítíðarpeningur | 467.514 | 424.537 |
| Depositum | 10.044.887 | 9.345.543 |
| Onnur skuld | 550 | 1.000.000 |
| Ákontugjald, útleiging | 314 | 108.851 |
| | **10.513.265** | **12.507.889** |

### 18. Veðsetingar og trygdarveitingar

Veð er latið upp á 908.063 t.kr. í grundøki og bygningum, har roknskaparligu virðini tann 31. desember 2025 eru 777.844.

norna.fo 512002

bústraðir
Føroya bústaðafelag

Yviri við Strond 6
Postrúm 215
110 Tórshavn

Tel. +298 401000
bustadir@bustadir.fo
www.bustadir.fo